## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, turt og sólglottar, menn mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og vestri og regn eitt skifti, annars sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fyrrapartin lot til andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í stívt andøvsgul av útsynningi og sirm ella mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur. Hitin um 12 stig. Sunnudagin minkar hann vindin av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin um 10 stig.

# Fimm virðislønir í Müllers Pakkhúsi

**Hósdagin 2. oktober 2008 klokkan 17 handar Tórshavnar kommuna Mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens og Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs í Müllers Pakkhúsi í Havn. Tilsamans fimm virðirslønir verða handaðar. Hvør teirra er 35.000 krónur**



**VIRÐISLØN**
*Tíðindaskriv*

50 ár eru liðin síðani fyrsta virðislønin varð latin, og heitið var tá Bókmentavirðisløn M. A. Jacobsens. Ein ella tvær virðislønir kundu verða latnar. Í 1972 varð Reglugerðin fyri Bókmentavirðisløn M. A. Jacobsens broytt, soleiðis at onnur virðislønin skuldi vera fyri fagurbókmentir og onnur fyri yrkisbókmentir.

Síðani 1985 hava tríggjar virðislønir verið latnar fyri ávíkavist fagurbókmentir, yrkisbókmentir og mentanaravrik. Allar tríggjar verða latnar í ár.

Í 1996 samtykti Tórshavnar kommuna at heitið skuldi verða Mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens.

Í nevndini fyri Mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens eru fimm limir. Teir verða valdir fjórða hvørt ár, tá ið nýtt býráð er valt og skipað. Kommunan velur tríggjar limir, Fróðskaparsetrið ein og Rithøvundafelagið ein.

Í nevndini sita Rigmor Dam, Erling Isholm og Jákup Jacobsen fyri Tórshavnar kommunu, Turið Sigurðardóttir fyri Fróðskaparsetrið og Vár í Ólavsstovu fyri Rithøvundafelagið. Eingin formaður er í nevndini. Fastur skrivari er býarbókavørðurin í Havn, Anna Brimnes.

Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs varð fyrstu ferð latin í 1977. Tá fingu Steinbjørn B. Jacobsen og Bárður Jákupsson hana. Tað var ein stórhending í sjeytiárunum, at føroyskar barnabøkur fingu tann heiður.

Í nevndini fyri Barnabókaheiðurslønina eru fimm limir. Fastur formaður fyri nevndina er formaðurin í mentamálanevnd Tórshavnar kommunu, sum í hesum valskeiðnum er Hildur Eyðunsdóttir. Barnabókavørðurin á Býarbókasavninum í Tórshavn, Malan Hilmarsdóttir, er somuleiðis fastur limur og skrivari í nevndini. Nevndarlimir eru eisini Hansina Huusgaard, skúlabókavørður, og Ann Elisabeth Joensen og Poulina Slættanes. Nevndin fyri Barnabókaheiðurslønina hevur heimild til at lata tvær heiðurslønir. Hon hevur eisini heimild til at lata eina ella onga. Í ár verða tvær heiðurslønir latnar á barnabókaøkinum.

Borgarstjórin handar virðislønina saman við grundgevingum frá nevndunum í Müllers Pakkhúsi hósdagin 2. oktober klokkan 17. Hvør virðislønin er 35.000 krónur.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -1 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 16 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 18 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | -- |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 13 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 11 |
| Berlin | 15 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 9 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 16 |
| Madrid | 18 |
| Róm | 19 |
| Malorca | 24 |
| Athen | 20 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | -- |
| New Dehli | -- |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 30 |
| New York | 25 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1034 hPa. vestan fyri Írland fer í landnyrðing. Eitt lágtrýst, 1001 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer í landnyrðing norðan og dýpist nógv.



**Í dag:**
Djúpa lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga norðureftir og kuldabrúgvin haðani nærkast Føroyum hósnáttina.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/08 kl. 06⁰⁰ – 10/09 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,4°
Minsti hiti máldur í september: 0,4° - Mesti hiti máldur í september: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 09/08 kl. 06⁰⁰ – 10/09 06⁰⁰.
Avfallið higartil í september: 43 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

Alt um harmonikur



www.simme.eu

Lesið Sosialin

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 20. september | Mánin næstur jørðini |
| 22. september | Seinna kvarter |
| 20. september | Tendring |
| 5. oktober | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Almanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. sept | 2:10 | 14:53 | 1:10 | 13:53 | 1:25 | 14:08 | 4:10 | 16:53 | 5:10 | 17:53 | 0:25 | 13:08 | - | 12:08 | 2:25 | 15:08 | 3:25 | 16:08 | 1:55 | 14:38 | 3:10 | 15:53 |
| 24. sept | 3:20 | 15:47 | 2:20 | 14:47 | 2:35 | 15:02 | 5:20 | 17:47 | 6:20 | 18:47 | 1:35 | 14:02 | 0:35 | 13:02 | 3:35 | 16:02 | 4:35 | 17:02 | 3:05 | 15:32 | 4:20 | 16:47 |
| 25. sept | 4:12 | 16:37 | 3:12 | 15:37 | 3:27 | 15:52 | 6:12 | 18:37 | 7:12 | 19:37 | 2:27 | 14:52 | 1:27 | 13:52 | 4:27 | 16:52 | 5:27 | 17:52 | 3:57 | 16:22 | 5:12 | 17:37 |
| 26. sept | 5:00 | 17:24 | 4:00 | 16:24 | 4:15 | 16:39 | 7:00 | 19:24 | 8:00 | 20:24 | 3:15 | 15:39 | 2:15 | 14:39 | 5:15 | 17:39 | 6:15 | 18:39 | 4:45 | 17:09 | 6:00 | 18:24 |